S-MAX og Galaxy:

# Allergitestaðir Fordar

**Nýggju Fordarnir, S-MAX og Galaxy, hava nýliga fingið TÜV-sertifikat og besta karakter fyri allergitest í kabinuni. Hetta verður gjørt, fyri at fólk sum líða av ovurviðkvæmi kunnu verða trygg við at keypa ein slíkan bil**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Teir báðir nýggju Fordarnir S-MAX og Galaxy hava nýliga fingið TÜV-sertifikat og besta karakter fyri allergitest í kabinuni. Sama heiður hava Ford Focus og Focus C-MAX eisini fingið.

Av tí at alt fleiri fólk líða av ovurviðkvæmi er tað vorði alt meira vanligt at nógvir ymiskir brúkslutir verða allergitestaðir, eisini bilar.

Øll kabinan verður testað fyri skaðilig evnir so sum trygdarbeltir, gólvmáttir, og annars alt plast-tilfarið inni í bilinum.

Hetta verður gjørt, fyri at fólk sum líða av ovurviðkvæmi kunnu verða trygg við at keypa ein slíkan bil, sum hevur fingið allergisertificat. TÜV er ein nógv vird týsk institutión, sum t.d. testar nógv ymisk ídnaðar- og forbrúkaraprodukt.




*Ford S-MAX er ein av bilunum, sum nýliga hevur fingið TÜV-sertifikat og besta karakter fyri allergitest í kabinuni*

---

Mazda6 2.0 Touring:

# Business Bilen 2006

*Mazda6 2.0 Tuoring stationcar er kosin sum besti businessbilur í Danmark 2006*




**Mazda6 2.0 Touring stationcar er av Business Danmark kosin sum besti businessbilur í Danmark 2006. Tað vóru arbeiðsumhvørvis-konsulentar, motorjournalistar og testkoyrarar sum valdu bilin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Business Danmark er ein organisatión fyri sølu- og marknaðarfólk og motorredaktiónina á Bilavisen, saman við arbeiðsumhvørviskonsulentum.

Mazda6 varð valdur í eini kapping, har serligur dentur varð lagdur á bilin sum arbeiðspláss. Tað vóru arbeiðsumhvørviskonsulentar saman við royndum motorjournalistum og testkoyrarum, sum valdu bilin til Business Bilen 2006

Tilsamans tólv bilar luttóku í kappingini. Teir vóru vurderaðir og mettir út frá hvussu teir vóru innrættaðir, hvussu teir vóru at sita í, trygdini, komforti, útgerð, koyrieginleikum, økonomi og hvussu lættir teir vóru at koyra og umgangast í tí dagliga. Prísurin hevði eisini stóran týdning í samlaðu vurderingini av bilunum.

Toyota:

# Heimsins størsti bilframleiðari




Leiðslan í Toyota hevur tikið avgerð um at gera íløgur upp á umleið 75 milliardir krónur tey næstu árini til bygging av nýggjum bilverksmiðjum, serliga uttan fyri Japan.

Toyota vænta, at sølan av nýggjum bilum fer at vaksa við millum 25 og 30 prosent tey næstu trý árini, og at teir longu í ár fara fram um General Motors sum heimsins størsti bilframleiðari.

*Kelda: Motor Magasinet*

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo